| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 17. juni 2015 |
| Býráðsfundur nr. | 06/2015 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2015 tann 17. juni kl. 17.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 11. juni 2015 um innkalling til fundar. Fundurin er framskundaður frá 18. juni til 17. juni 2015, hetta sambært fráboðan.

**Møttir vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Jann N. Toftegaard
Asbjørn Berthelsen

Asbjørn Berthelsen møtti sum varalimur fyri Siggu Óladóttir Joensen á lista D, sum er burturstødd. Sigga hevur skrivliga boðað frá, at varalimur hennara Asbjørn Berthelsen møtir á fundinum.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 33 /2015.**

***Uppskot til broyttan bygnað fyri mentannarøkið í Fuglafjarðar kommunu.***

Mentamálanevndin heitti tann 10. mars 2015 á SPF Leiðsluhúsið um at standa fyri arbeiðinum við at gera ein nýggjan bygnað fyri mentanarøkið í kommununi, og at hetta arbeiðið skuldi verða handað nevndini fyrst í juni, so málið kundi verða lagt fyri seinasta býráðsfund fyri summarfrítíðina til avgerðar.

Fleiri fundir og samskiftir hava verið partanna millum, eins og ein verkætlanarbólkur við 7 limum varð settur til at arbeiða við bygnaðinum fyi mentanarøkið undir leiðslu av Leiðsluhúsinum.

Talan er um persónar, sum dagliga eru starvsett hjá kommununi við atliti til mentan, umboð fyri skúlaleiðsluna, mentanina í býnum, vinnulívið og uttanhýsis persónur, sum arbeiðir í aðrari kommunu og sum dagliga starvast innan mentanarøkið.

Umboð fyri Leiðsluhúsið og verkætlanarbólkurin vórðu á fundi við mentamálanevndina tann 09. juni og løgdu arbeiði fram fyri nevndina, eins og eitt tilmæli eisini varð latið nevndini og uppskot til lýsan eftir leiðara til mentanarøkið.

*Tilmæli byggir í høvuðsheitum á at:*

- Gera eina mentanar- og ferðavinnustrategi at branda og marknaðarføra samlaðu tilboðini í Fuglafjarðar kommunu
- Seta á stovn formelt toymi fyri mentan, har umboð fyri verandi mentanarøkir, umframt vinnulív og áhuigafeløg/eldsálir eru fastir limir
- Skipa eitt miðsavnað fysiskt arbeiðsumhvørvi fyri alt mentanarvirksemi í Fuglalafjarðar kommunu.
- Seta ein leiðara til hetta umhvørvi.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi 09. juni 2015 og mælir einmæld býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá Leiðsluhúsinum/
verkætlanarbólkinum til nýggjan bygnað fyri mentanarøkið, og at tilmælini verða sett í verk sambært hjálagdari verksetanarætlan.

Nevndin varð samd um, at umboð fyri Leiðsluhúsið og verkætlanarbólkurin eiga koma á býráðsfundin fyri at sýna býráðslimunum framløgurnar og tilmælini og at greiða nærri frá arbeiðinum. Rættast er, at framløgurnar verða hildnar, áðrenn málið kemur til viðgerðar og avgerðar á býráðsfundinum.

*Sambært avtalu við borgarstjóran verða framløgurnar lagdar fram fyri býráðið í býráðssalinum kl. 16.00.*

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinumn frá mentamálanevndini og góðkenna tilmælið til nýggjan bygnað fyri mentanarøkið. (9-0).

**Mál nr. 34/2015.**

**Mál viðvíkjandi reingerð av Fuglafjarðar skúla.**

Mentamálanevndin hevur mótitkið skriv frá sosialu nevndini, dagfest 18. Mai 2015, har nevndin á fundi hevur viðgjørt málið skipan av reingerðingararbeiðinum av nýggjum, hetta við atliti til, at býráðið hevur tikið avgerð um at siga sáttmálan við SP/F Sofus Baldvinson upp til 31. august 2015.

Uppskot frá nevndini er, at í lýsingini skal standa, at kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomin tilboð ella einki at taka.

Sosiala nevndin samtykti á fundinum 18. mai h.á. einmælt at heita á mentamálanevndina um at bjóða vaskiarbeiðið út í Fuglafjarðar skúla tíðaravmarkað í eitt ár, um lógir og reglur loyva tí. Nevndin heldur somuleiðis, at kommunan eigur at hava fólk úr býnum at gera hetta vaskiarbeiði, tá ið tað er okkara skúli, sum skal verða reingjørdur.

Fyrisitingin hevur sent teldupost til Eyðbjørn Larsen, løgfrøðing kommununar tann 27. mai 2015 um málið um útbjóðingina, og svarar hann kommununi aftur við telduposti, dagfestum 27. mai h.á.

"*Meginreglan ella fyritreytin fyri at bjóða eina tænastu út er, at kommunan fær eina so góða tænastu fyri ein so góðan prís sum gjørligt. Tá tað í prinsippinum er líka mikið, um veitarin er úr kommununi ella ikki. At gera mun á, um skrásett í kommununi ella ikki hevur einki við tænastuna ella prísin at gera, tó at man skilir, at ein kommuna við brúka lokalar veitarar, ið rinda skatt lokalt.*

So bjóðar kommunan út alment hevði hann ikki sett krav um, at talan skal verða um lokalar veitarar e.l. Hinvegin kunnu tit t.d. innheinta nøkur tilboð lokalt og so taka støðu til innkomnu tilboðini".

Mentamálanevndin viðgjørdi málið á fundi 01. Juni 2015, og har komu ávís sjónarmið fram, eitt nú við at kommunan lýsir eftir og setir kommunal reingerðingarfólk undir eftirliti og ábyrgd av húsavørðinum við Fuglafjarðar skúla í eini royndartíð upp á eitt ár frá 15. august 2015 at rokna.
Um henda skipan verður sett í verk, so hevur mentamálanevndin eitt víðkað grundarlag fyri støðutakan í 2016, sum eisini kemur at taka atlit til fíggjarliga partin av reingerðini, um henda møguliga er bíligari fyri kommununa, somuleiðis sum dygdin er á eins høgum støði, sum hon er ídag.

Nevndin viðgjørdi eisini møguleikan fyri at taka málið um reingerðina upp aftur við SP/F Sofus Baldvinson, og møguliga leingja sáttmálan við einum ári frá 01. september 2015 til 31. august 2016, hóast býráðið tann 01. mai 2014 hevur tikið avgerð um at siga sáttmálan upp til 31. August 2015.

Í hesum sambandi varð millum annað nomið við spurningin, um tað ikki er alt ov stutt skotbrá bæði at bjóða reingerðina út og eisini at fáa sett neyðug reingerðingarfólk, tí summarfrítíðin stendur fyri framman, og kommunan skal hava eina ella aðra loysn fyri reingerðina av skúlanum í hús í seinasta lagi 15. august 2015.

Avtalað varð, at nevndin skuldi boða Sofus Baldvinson til fundar týsdagin 02. Juni 2015 kl. 09.00. Nevndin setti seg telefoniskt í samband við viðkomandi, somuleiðis sum hann fekk at vita, hvat fundurin snúði seg um, og boðaði hann frá, at hann møtti á fundinum fyri at umrøða viðurskiftini um, at SP/F Sofus Baldvinson átók sær reingerðina eitt ár aftrat, t.v.s. frá til 31. august 2016.

Mentamálanevndin viðgjørdi málið aftur á fundi tann 02. juni 2015, og hevði sum lýst omanfyri fund við Sofus Baldvinson, sí fundarfrásøgn. Sum framgekk á fundinum hevði SP/F Sofus Baldvinson einki ímóti, at sáttmálin frá 02. September 1991 varð longdur eitt ár aftrat, men vildi hann hava boð um hesi viðurskifti, so skjótt sum gjørligt, eftir at býráðsfundurin 17. jJuni 2015 var lokin og avgerð tikin.

Mentamálanevndin hevur aftur viðgjørt málið á fundi 03. juni 2015 og mælir býráðnum til at leingja sáttmálan millum kommununa og SP/F Sofus Baldvinson, dagfestur 02. september 1991 við seinni broytingum í 1 ár aftrat frá 01. september 2015 at rokna, og at smápartafelagið tekur sær av reingerðini av Fuglafjarðar skúla í hesum tíðarskeiði. Sáttmálin í hesum tíðarskeiði eisini verður prístalsviðgjørdur, tá ið tað snýr seg um lønar- og tilfarsbroytingar.

Nevndin er samd um, at arbeitt eigur at verða miðvíst við reingerð av øllum kommunalum stovnum, soleiðis at vit ikki koma í somu støðu komandi ár, sum vit eru komin í nú, har eingi viðurskifti tíverri eru komin upp á pláss.

**Avgerð:**
Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. Sostatt verður sáttmálin við SP/F Sofus Baldvinsonlongdur til 15. august 2016. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.00.

Magnus S. Midjord

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Jann N. Toftegaard

Asbjørn Berthelsen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen